**29. des. 2011AK/jm**

# Kunning um verkætlanir játtaðar av fiskivinnuroyndum 2012

## Alment:

Fiskivinnuroyndir hevur sum stevnu at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum. Í Programminum fyri Fiskivinnuroyndir fyri 2009-2012 eru 3 raðfest øki, sum serligur dentur verður lagdur á (sí viðfest programm og lýsing 2012):

1. Burðardyggur fiskiskapur
   Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar
2. Royndarveiða og virðisøking av fiski
   Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar
3. Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
   Hetta kunnu vera fyrisitingarligar, fíggjarligar, hagfrøðiligar, samfelagsligar ella búskaparligar kanningar ella greiningar, sum leggja afturat okkara vitan um fiskivinnuna, og harvið menna grundarlagið undir vinnuligum politiskum avgerðum

## Játtanir fyri 2012:

Fiskimálaráðið hevur gjørt av fyribils **at játta 1,650 mió. kr. til 8 nýggjar verkætlanir í 2012** frá Fiskivinnuroyndum, **og at lýsa eftir nýggjum verkætlanum aftur fyrst í komandi ári.**
14 nýggjar umsóknir fáa ikki játtað stuðul í 2012. Hesar hava tó møguleika fyri at søkja av nýggjum, tá lýst verður aftur eftir verkætlanum fyrst í komandi ári[1].

**Harumframt eru 1,530 mió. kr. játtaðar til 8 framhaldandi verkætlanir**, sum byrjaðu í 2010 og 2011, sí fylgiskjal 1.

**Tilsamans fáa hesar 16 verkætlanir** sostatt játtað **3,385 mió. kr., harav 3,135 mió. kr. eru fyri 2012 (og 0,250 mió. kr. fyri 2013).**

Tær 22 nýggju og 8 framhaldandi verkætlanirnar søktu hesaferð um tilsamans 10,168 mió. kr. harav 8,478 mió. kr. fyri 2012. Nakað færri umsóknir vóru í ár (30) enn seinasta ár (32), men hetta er nakað tað sama sum í 2010 (29) og 2009 (26). Áhugavert er at leggja til merkis, at í ár er fíggjarstyrkurin, sum verkætlanir søkja um frá FVR væl minni enn undanfarin ár (28,9%)[2] av samlaða metta kostnaðinum av verkætlanunum. Men hetta er ikki tí, at umsitararnir av verkætlanunum seta nógvan reiðan pening í verkætlanirnar, men heldur tí, at talan er um "eginavrik og eginfígging", sum kemur fram sum "kapitaliseringar av eginavriki ella mettum virðum", sum verður latin til verkætlanina[3].

[1] Ætlandi ultimo februar/primo mars 2012
[2] Í 2011 40,4%, í 2010 41%, í 2009 34% og í 2008 góð 42%, sum var væl minni enn í 2007, tá talið var 2/3.
[3] Innanfyri rímilig mørk er í lagi, men reiður peningur má eisini síggjast í verkætlanini.

**Tá lýst verður av nýggjum,** verður ein treyt, at (vinnuligur) umsøkjari má vísa á, at viðkomandi setir (veruligan) reiðan pening í verkætlanina eisini. Betri samsvar má vera millum ta kontantu fígging søkt verður um, og tað, ein sjálvur setir í verkætlanina av reiðum peningi (og ikki bert mett/kapitaliserað eginavrik).
Fyri 2012 merkir hetta, at bert góð helvtin av umsøkjarunum (16/30) fáa játtað stuðul hesa ferð, men møguleiki verður fyri vinnuligar umsøkjarar at søkja av nýggjum í febr./mars (1,1 mió. kr.).

Umsóknirnar hava verið viðgjørdar eftir sama leisti sum undanfarin ár, og eru mannagongdirnar fyri viðgerðini lýstar á heimasíðuni [www.fvg.fo](http://www.fvg.fo).
Aftur í ár varð serligur dentur lagdur á at fáa verkætlanir innan ásettu 3 høvuðsøkini[4].
Í ár fingu øll trý raðfestu økini stuðul eins og bæði í 2011 og 2010, (men bert tvey av raðfestu økjunum fingu stuðul í 2009).

Seinnu árini hevur dentur verið lagdur á at fáa vinnufyritøkur at luttaka meira í verkætlanum, men hetta kann ikki sigast at hava verið serliga væl eydnað higartil, tá hugsað verður um, <u>hvussu lítið av reiðum peningi hevur verið í umsóknunum</u>. Hetta hevur stýrið fyri FVR avgjørt má broytast, og hevur tí avgjørt at lýsa eftir (vinnuligum) verkætlanum av nýggjum fyrst í komandi ári.

Í ár hava vinnufyritøkur fyribils fingið 50% av útlutaðu upphæddini, men hava møguleika fyri at fáa upp til 63% (tá lýst verður aftur). Hetta skal samanberast við 54% fyri alt árið í fjør.

Havstovan hevur í fyrsta umfarið fingið 1/3, sum er eitt sindur minni enn tað tey fingu í fjør, men 25% um vit hugsa um tøku játtanina fyri 2012 (móti 33% í 2011 og 25% í 2010), PhD og vinnugranskarin hava fingið 9% (móti 8% í fjør), og aðrir almennir stovnar (NVD) hava fingið 2%.

Býtið av játtanini kann vísast soleiðis:

| Játtanar-býtið, tá 73% av játtanini er útlutað: | Játtan (73%) 2012 - kr. | Absolutta býtið % | Relativa býtið % | Væntað endaligt býti | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| VF - Vinnufyritøkur | 1.557.500 | 50% | 36% | 63% | 54 |
| PhD+V.gr. | 381.238 | 12% | 9% | 9% | 8 |
| Kjarnurnar (niðurlagdar) | 0 | 0% | 0% | 0% | 0 |
| Havstovan | 1.096.250 | 35% | 25% | 25% | 36 |
| Aðrir almennir stovnar. | 100.000 | 3% | 2% | 2% | 2 |
| | 3.134.988 | 100% | 73% | 100% | 100 |
| Samlað játtan | 4.308.000 | | | | |
| Ikki býtt út enn: | 1.173.012 | | 27% | 0% | |
| | Tilsamans | 100% | 100% | 100% | |

Grafiskt er hetta víst á næstu síðu.

[4] 1) Burðardyggur fiskiskapur, 2) Royndarveiða og virðisøking av fiski og 3) Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni




Tær báðar Granskingarkjarnurnar: Kjarnan fyri Veiði- og Reiðskapstøkni (við denti á at minka oljunýtsluna (orkusparing)) og Kjarnan fyri Framleiðslutøkni (við denti á framleiðslu og gagnnýtslu av allari hjávøru (biotøkni)), sum Fiskimálaráðið setti á stovn 1. juni 2009, og sum vórðu niðurlagdar í september 2010, eru bert tiknar við her, tí tær innganga í hagtalsyvirlitinum 2004-12. Játtanin til Granskingarætlanir fall burtur í 2010.
Hetta uppbýtið av játtaðum stuðli hevur verið nýtt í nøkur ár, og sæst hetta væl á stabbamyndini niðanfyri. Hesaferð, eins og í fjør, hava vit býtt stuðulin til almennar verkætlanir upp í tvey – stuðul til verkætlanir á Havstovuni og stuðul til verkætlanir á øðrum stovnum enn Havstovuni[5]:




Almennir stovnar í talvuni merkir aðrir almennir stovnar enn Havstovan (NVD).

[5] Stuðul hevur verið latin til Havstovuna (2004-12) og Fróðskaparsetur Føroya,/NVD (2007-08 + 11-12)

Framhaldandi verður bert ein vinnugranskaraverkætlan stuðlað í 2012, men roknað verður við, at hesin heldur á fram í einum PhD-granskingarætlan (frá 1/5-12). Ynskiligt er, at vinnan ger meira nýtslu av hesum møguleikanum at “seta” granskarar inn í virkini (FVR endurrindar upp til 50% av kostnaðinum fyri ein vinnugranskara, tó í mesta lagi 300.000 kr. árliga í upp til 3 ár).

Lýst verður aftur eftir nýggjum verkætlanum fyrst í komandi ári.
**Tá lýst verður av nýggjum** verður ein treyt, at (vinnuligur) umsøkjari má vísa á, at viðkomandi setir (veruligan) reiðan pening í verkætlanina eisini. Betri samsvar má vera millum ta kontantu fígging, søkt verður um, og tað, ein sjálvur setir í verkætlanina av reiðum peningi (og ikki bert mett/kapitaliserað eginavrik). [6]

jm

## Árligu játtanirnar í tølum og prosentum:

2004-2012

| Býtið 1000 kr. | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnufyritøkur | 2045 | 2425 | 2185 | 1975 | 1975 | 316 | 2272 | 2721 | 1558 |
| PhD og V.gr. | | 378 | 800 | 1139 | 1242 | 581 | 1243 | 524 | 381 |
| Granskingarkjarnurnar | 481 | 450 | 641 | 150 | 460 | 1118 | 245 | | 0 |
| Havstovan | 2454 | 1772 | 1377 | 1480 | 1064 | 140 | 1241 | 1659 | 1096 |
| Aðrir alm. stovnar | | | | 258 | 258 | | | 100 | 100 |
| Tilsamans | 4980 | 5025 | 5003 | 5002 | 4999 | 5001 | 5001 | 5004 | 3135 |
| | | | | | | | | Játtað hesaferð | 73% |
| | | | | | | | | At útluta seinni | 27% |

2004-2012

| Býtið í procentum | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnufyritøkur | 41 | 48 | 44 | 39 | 40 | 63 | 45 | 54 | 50% |
| PhD og V.gr. | 0 | 8 | 16 | 23 | 25 | 12 | 25 | 8 | 12% |
| Granskingarkjarnurnar | 10 | 9 | 13 | 3 | 9 | 22 | 5 | 0 | 0% |
| Havstovan | 49 | 35 | 28 | 35 | 26 | 3 | 25 | 36 | 35% |
| Aðrir alm. stovnar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 3% |
| Tilsamans | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100% |

[6] Ætlandi ultimo februar/primo mars 2012

# Fylgiskjal 1: Verkætlanir 2012

| Id. | Navn (stytt/langt) | | | Játtað 2012 |
|---|---|---|---|---|
| | **Framhaldandi verkætlanir:** | | | **1.529.988** |
| 11/01452 | **Hermix (Nordic network for the stock identification an increased value of Northeast Atlantic herring)** | BF/RVF/BSMF | A | **100.000** |
| 11/01464 | **PGs, GAGs and collagen (Proteglycans (PGs), glycosaminoglycans (GAGs) and collagen in the connective tissue of fish muscle)** | VF | V | **250.000** |
| 11/01439 | **Virðisøking av línufiski (við betri hagreiðing við veiðu til framleiðslu)** | RVF | V | **200.000** |
| 11/01492 | **Arctica islandica (Annual variation in productivity on the Faroe Shelf during the 20th century)** | BF | H | **298.750** |
| 11/01463 | **PhD: Tað pelagiska kompleksið (í Norðuratlantshavi)** | BSMF | PhD | **231.000** |
| 11/01404 | **Blood pressure (The effect of gelatin/collagen hydrolysate on blood pressure)** | VF | V | **300.000** |
| 11/01458 | **PhD: Havtaska í føroyskum sjógvi** | BF | PhD | **75.238** |
| 11/01488 | **PBP (Vinnugranskari) Fra Peptoner til Bioaktive Peptider** | VF | Vgr.(/PhD) | **75.000** |
| | **Nýggjar verkætlanir:** | | | **1.605.000** |
| 11/01422 | **Toskur og hýsa á innaru leiðum: Útbreiðsla og fiskiskapur** | BF | H | **525.000** |
| 11/01433 | **Makreltrol til smærri bátar** | RVF | V | **92.500** |
| 11/01434 | **Skiljirist at skilja sild frá makreli** | RVF | V | **240.000** |
| 11/01436 | **Makrelur á landgrunninum 2** | BF/RVF/ BSMF | H | **247.500** |
| 11/01437 | **Fitiinnihaldið í makreli í føroyskum øki** | RVF | H | **100.000** |
| 11/01441 | **Udvikle og producere gogagn** | BF/RVF/ BSMF | V | **100.000** |
| 11/01442 | **Skera brúnan tara** | RVF/BF | V | **100.000** |
| 11/01450 | **WhitefishMaLL (North Atlantic whitefish Marine Living Lab)** | BSMF | V | **200.000** |
| | **Verkætlanir tilsamans (8+8):** | | | **3.134.988** |

Styttingar:
BF: Burðardyggur fiskiskapur
RVF/VF: Royndarveiða og virðisøking av fiski
BSMF: Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
Vgr: Vinnugranskaraverkætlan
Phd: PhD-verkætlanir.
pD: Post Doc-verkætlan (er her íroknað almennar verkætlanir)
V: Vinnuverkætlanir,
H: Havstovan
A: Almenn verkætlan, sum ikki er Havstovan

## Programm 2009-2012

### Stevna

Stevnan fyri fiskivinnuroyndir er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.

### Raðfest øki

### Burðardyggur fiskiskapur

Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar, t.d.:

- at menna tøkni, ið fer varliga við umhvørvinum og minkar um orkunýtsluna pr. kg ráfisk
- at menna vitanina um fiskalívfrøðina
- at menna skipanir fyri máting av fiskiveiðiorku

### Royndarveiða og virðisøking av fiski

Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar, t.d.:

- royndarveiða eftir fiskasløgum, sum ikki verða gagnnýtt sum er
- at fáa størri part av tilfeinginum til matna og finna marknaðir
- at lýsa og loysa praktiskar trupulleikar at fáa alla veiðu til høldar
- at gera lívtøkni[7] til sjálvsagdan part í gagnnýtslu av havtilfanginum
- fáa fram og nýta eginleikarnar, sum havtilfeingið hevur á fólkaheilsuna
- at menna talgildar loysnir, sum betri skjalfesta sporføri og økja um vitanina um tilfeingi, fiskiskap og framleiðslu

### Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni

Hetta kunnu vera fyrisitingarligar, fíggjarligar, hagfrøðiligar, samfelagsligar ella búskaparligar kanningar ella greiningar, sum leggja afturat okkara vitan um fiskivinnuna, og harvið menna grundarlagið undir vinnuligum politiskum avgerðum t.d.:

- tilfeingisbúskapur og fyrisiting
- avgerðarrættur og ognarskapur í fiskivinnuni
- skipan av framtíðar fiskiskapi og flota undir Føroyum
- ferðafólkafiskiskapur – hvussu skipa hesa vinnu, soleiðis at sum mest fæst burturúr

---

[7] Biotøkni, biotechnology

**Fiskivinnuroyndir 2012**

**Lýsing eftir umsóknum**

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum

Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:

- Burðardyggur fiskiskapur
- Royndarveiða og virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni

Serligur dentur verður lagdur á, at:

- vinnan tekur lut í verkætlanini
- eginfígging ella onnur fígging er
- samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- at verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%[8].

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi **týsdagin 15. november 2010, kl. 12:00**

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara, við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2011.

Jákup Mørkøre, samskipari
tlf.: 35 30 30 / 35 32 48
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

Umsóknir skulu sendast til:
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Bókbindaragøta 8
FO-110 Tórshavn

[8] max. 300 kkr./ár í 3 ár